## Kári P. Højgaard varðveitir tingsessin

**Eftir fínteljingina í Suðurstreymi og Eysturoy hóskvøldið gjørdist endaliga greitt, at tað verður Kári P. Højgaard, sum fer at røkja tingsessin hjá Sjálvstýrisflokkinum komandi valskeið**

FÍNTELJING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Tættari kundi tað ikki verða. Eftir fínteljingina Eysturoyar- og Suðurstreymoyar valdømi, var bert ein atkvøða á muni á Sjálvstýrislistanum. Tá avtornaði endaði Sjálvstýrisflokkurin í Eysturoynni omaná og tískil varðveitir formaður floksins Kári P. Højgaard sín tingsess

Sjálvstýrisflokkurin í Suðurstreymi fekk eina atkvøðu afturat í fínteljingini, meðan atkvøðutalið hjá Sjálvstýrisflokkinum var óbroytt í Eysturoynni. Undan fínteljingini vóru tvær atkvøður á muni millum Eysturoyar- og Suðurstreymoyar valdømi, og eftir fínteljingina var munurin bert ein atkvøða.

Malan Johansen, sum fekk eitt rimmar val við 212 persónligum atkvøðum í Suðurstreymi, gjørdist tí ov stutt til ein tingsess hesaferð og tí fer Kári P. Højgaard at røkja tingsessin hjá Sjálvstýrisflokkinum komandi valskeið.

# Finnur Helmsdal fer á ting

**Finnur Helmsdal vann lutakastið um at gerast triði valdømisvaldið hjá Tjóðveldisflokkinum í Suðurstreymi. Finnur slær fast, at hann ætlar sær á ting og hjartamálini verða barnaforsorgin, tey sálarsjúku og viðurskiftini hjá pápunum**

LUTAKAST
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Finnur Helmsdal verður triði tingmaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum í Suðurstreymi. Hesaferð tekur hann av tilboðnum um at gerast tingmaður. Eitt av aðalmálunum hjá honum verður tryggja pápum betur viðurskifti í samband foreldrarættindi*

*Mynd: Savnsmynd*

Eydnan var við Finni Helmsdal í lutakastinum hóskvøldið, tá triði tingsessurin hjá Tjóðveldisflokkinum í Suðurstreymi skuldi finnast. Fínteljingin broytti ikki atkvøðutalið og tískil varð neyðugt við einum lutakasti millum Finn Helmsdal, Róa Egholm og Jógvan Arge. Finnur Helmsdal vann lutakastið og tí verður tað hann, sum fer at umboða Tjóðveldisflokkin á tingi komandi valskeið

Støðan hjá Róa Egholm, Finni Helmsdal og Jógvani Arge hevur verið rættiliga margháttlig, síðan úrslitið av valinum í Suðurstreymi varð kunngjørt. Allir tríggir fingu 197 persónligar atkvøður og endaðu sum nummar trý á tjóðveldislistanum í Suðurstreymi.

Til seint hóskvøldið visti hvørgin teirra, um teir vóru fuglur ella fiskur í tinghøpi. Hóskvøldið gjørdist so endaliga greitt, at Finnur Helmsdal er valdur á ting, meðan Rói Egholm er fyrsti varamaður og Jógvan Arge annar varamaður.

### Tekur av

Fyri mong var tað rættiliga óvæntað, at Finnur Helmsdal gjørdi av at stilla upp til løgtingsvalið hesaferð, tí seinasta árið hevur nakað av rumbli verið um hansara persón. Umframt opið stríð í fjølmiðlunum við Páll á Reynatúgvu, tók Finnur Helmsdal ikki av møguleikanum um at gerast tingmaður, tá Annita á Fríðriksmørk í heyst fekk starvið sum landsstýriskvinna í mentamálum.

Grundgevingin var millum annað, at hann hevði júst fingið leiðarastarvið á Føroya Barnaheimi og at hann raðfesti býráðssessin í Havn hægri. Kortini játtaði Finnur Helmsdal at stilla upp fyri Tjóðveldisflokkin í Suðurstreymi og nú stendur so ein tingsessur honum aftur í boði.

Finnur Helmsdal slær fast, at hesaferð tekur hann av møguleikanum.

– Nú eri eg valdur og eg fari í tingið, sigur hann.

Hetta er fyrstu ferð, at Finnur Helmsdal er valdur á ting. Hann hevur kortini havt sæti á tingi fyrr, eitt nú í valskeiðnum 1998-2002, tá hann var varamaður fyri Høgna Hoydal, sum var landsstýrismaður.

*Hevði tú væntað undan valinum at verða valdur?*

Nei, eg eri bilsin av tí. Eg hevði ikki væntað, at Kristina (Háfoss, blðm) gekk so nógv aftur. Nú segði eg eisini nei til tingsessin seinast og nógv hava sett spurning við, um eg eri ein nóg seriøsur politikkari, tá eg valdi at siga nei. Eg eri kortini glaður um endaliga úrslitið og eg fari at gera mítt besta, sigur Finnur Helmsdal

Spurdur, um hann kann røkja leiðarastarvið á Føroya Barnaheimi og tingsessin samstundis, svarar Finnur Helmsdal, at nú er so stutt fráliðið, síðan hann fekk boðini um tingsessin, at hann hevur ikki enn tosað nærri við Føroya Barnaheim, men hann vónar, at ein hóskandi loysn kann finnast.

### Forsorg, pápar og sálarsjúk

Finnur Helmsdal hevur aldrin dult fyri, at hansara aðalmál hava altíð verið innan sosiala økið. Komandi valskeið ætlar hann at halda á við at raðfesta sosiala økið fremst. Millum málini, Finnur ætlar at virka fyri, eru barnaforsorgin, tey sálarsjúku, tey brekaðu og rættindini hjá pápum.

Hann heldur, at pápar í alt ov stóran mun eru við skerdan lut, tá vit tosa um foreldrarættindi, tá foreldrini eru farin hvør til sín.

– Menn í Føroyum standa alt ov veikt, tá tað um foreldrarætt ræður. Har er eingin javnstøða, tí kvinnan stendur nógv sterkari enn maðurin. Hetta er bæði galdandi fyri gift fólk og fólk sum hava livað saman og velja at fara hvør til sín. Hetta ætli eg at gera nakað við, sigur Finnur Helmsdal at enda.

# Norröna fór av landinum í gjár

**Norröna er í nóg góðum standi til at fara av landinum til umvælingar. Tað verður ein skipasmiðja í týska havnarbýnum, Hamburg, sum fer at umvæla Norrönu**

NORRØNA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Norröna fór av landinum fríggjadagin til umvælingar. Kári Durhuus, fjølmiðlaráðgevi á Smyril Line, sigur, at týsku serfrøðingarnar, sum skuldu sýna Norrönu, meta, at hon er í nóg góðum standi til at sigla niður á meginlandið.

Tað verður ein skipasmiðju í týska havnarbýnum, Hamburg, sum skal umvæla Norrönu. Valið stóð í millum eina skipasmiðju í Póllandi og í Hamburg, men eftir prísi og umvælingartíð, valdi leiðslan á Smyril Line tilboðið frá skipasmiðjuni í Hamburg.

Gongur alt sum ætla verður Norröna í Hamburg mánamorgunin. Á Smyril vænta tey, at umvælingarnar fara at taka ein góða mánað.

Stjórin á Smyril Line, Óli Hammer verður við á ferðini til Hamburg. Skipari á Norrönu verður Hendrik Hammer.



*Fríggjadagin fór Norröna av landinum til umvælingar. Hon bleiv sleipa út um molan*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



# Nýggj havn til Norrönu í Runavík ella á Tvøroyri

**– Í sambandi við nýggju ferjuleguna á Trongisvágsfirði er tað sjálvsagt at gera hana soleiðis, at Norrøna kann brúka hana í eini neyðstøðu. Runavíkingar vilja hava Norrønu at sigla fast til Runavíkar, áðrenn teir gera nakað**

NORRØNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*




*Tað er ógvuliga ivingarsamt, um Norrøna fær nakra neyðhavn í Føroyum, sum hon kann brúka, tá ið veðrið ikki er til vildar í Havnini*

Tað er ov lítið, at Norrøna bara hevur eina havn í Føroyum, sum hon kann brúka.

Tað er eitt sjónarmið, sum fleiri ferðir hevur verið nevnt.

Men í høvuðsstaðnum er ikki ætlanin at byggja meiri út til Norrønu, tí borgarstjórin er sannførdur um, at Tórshavnar Havn er ein góð havn hjá Norrønu.

– Fyri tað um eitt einstakt, ógvuliga harmiligt óhapp hendir, mugu vit ikki leypa framav, sigur Jan Christiansen.

Men síðani eru tveir aðrir møguleikar nevndir.

Pauli Einarsson, sum er býráðslimur á Tvøroyri heldur, at tað er sjálvsagt, at nýggja samferðsluhavnin á Trongisvágsfirði verður gjørd soleiðis, at Norrøna eisini fær brúkt hana í eini neyðstøðu, tá ið ivaveður er í Havn.

Hann sigur, at tað einasta, sum skal gerast við ætlaðu ferjuleguna, sum verður gjørd á Trongisvágsfirði, er at breiðka ferjuskráan, so at hann verður nóg breiður til hekkuportið á Norrønu.

– Nú, vit eru í ferð við at gera ferjulegu, skal eisini ferjuskrái til Smyril gerast. Men tað er sjálvsagt, at hann verður gjørdur so mikið breiður, at Norrøna eisini kann brúka hann.

Hann sigur, at hetta kostar ikki nógv afturat tí, sum verður gjørt.

Hann sigur, at hann hevur umrøtt málið við allarflestu politikarar úr Suðuroynni, men hvat hendir víðari, er nú í teirra hondum.

### Sigla fast til Runavíkar

Tann møguleiki hevur eisini verið nevndur at gera ferjuskráa til Norrønu í Runavík.

Borgarstjórin har, Rodmundur Nielsen, sigur, at ongin áheitan er komin frá Smyril Line um at gera ferjuskráa í Runavík.

Hann harmast almikið um óhappið hjá Norrønu og vónar, at Smyril Line kemur heilskapað burturúr støðuni.

Men hann sigur, at í Runavíkar Havn verður bygt út eftir tørvi og skal nakað byggjast út, skal ein brúkari vera.

Hann sigur, at skal havnalagið í Runavík byggjast út til Norrønu, verður tað neyðugt, at Norrøna tekur Runavík uppí ferðaætlanina og fer at sigla fast til Runavíkar, í hvussu so er um veturin.

– Skulu vit byggja út í Runavík, verður tað sostatt neyðugt at tosa við Smyril Line um eina vetrarferðaætlan, har Norrøna eisini siglur til Runavíkar, sigur hann.

Tað, vit hava fingið at vita av Smyril Line, er spurningurin um eina aðra havn til Norrønu ikki viðgjørdur.

Men í Smyril Line eru tað eisini tey sum siga, at tey duga ikki at síggja endamálið í at Norrøna skal hava eina neyðhavn, tí vanliga skal allarmesti farmurin til Havnar og tann allarmesti farmurin, sum skal við henni aftur av landinum, er eisini í Havn.

HEILT ÓTRÚLIG ÚTSØLA
Handlarnir við Káta Hornið spreingja øll mørk!!!
FANDANGO avsláttur upp í ÷60%
STÁSIÐ avsláttur upp í ÷60%
BIXIN avsláttur upp í ÷75%
BASIC avsláttur upp í ÷60%
Skalt TÚ gera KVETTIÐ, mást tú SKUNDA TÆR!